


# Stytsti vegur til vælveru er ein vitjan hjá Siri

**Tað eru næsta ár 25 ár síðani, at handilin Siri sá dagsins ljós. Og líka síðani hevur dentur verið lagdur á "quality of life", ella snøgt sagt; vælveru**

Sjálv er Siri ikki í iva, tá honskal lýsa verksemið, ið handilin stendur fyri.

- Tað snýr seg um "quality of life", ella vælveru! Tá eg standi mitt í handilshølunum, so kann eg siga, at allar vørurnar standa her, tí at vit kunnu standa inni fyri teimum, sigur Siri, og nevnir fleiri vørur og merkir.

Og sama er galdandi, um vit nevna náttúruvørurnar. Tað snýr seg um góðsku, og merkir, ið borga fyri góðsku.

## Tænasta

– Men eg velji eisini frá. Er t.d. talan um undirklæði, ið kanska ikki rigga, so eri eg so næsadjørv, at eg velji tey frá. Vit selja ikki bara fyri at selja, og eg vil heldur, at kundin fer avstað við ongum, um vit ikki hava røttu vøruna. Ta er betri at siga, at viðkomandi kanska kann koma aftur, um vit kunnu fáa hendur á vøruni, sigur Siri.

Í øðrum førum kann talan eisini vera um, at kundi t.d. hevur ilt í knæðnum. Tá verður ofta spurt, um hetta hevur verið so í longri tíð, tí um so er, so verður heldur mælt viðkomandi til at fara til lækna, heldur enn at keypa eitthvørt.

– Kundatænasta hevur alt at siga. Vit bjóða ikki kundunum nakað, ið vit ikki kunnu standa inni fyri, og vit selja ikki bara okkurt. Vit kenna ábyrgd, sigur Siri.

## Røttu vøruna til kundan

– Vit selja eisini undirklæðir til barmfagrar kvinnur og stórar kvinnur, sigur Siri.

– Vit ráðgeva eisini kvinnum. Tá tær t.d. keypa undirklæði, so kann tað vera, at vit tosa um, hvørja blus hevði verið hóskandi at nýtt saman við, sigur Siri.

– Vit hava sum heild sum mál at selja røttu vøruna til kundan, sigur Siri, og leggur dent á, at tað er betri, at kundin fer avstað við ongum, heldur enn at viðkomandi hevur keypt eitthvørt, ið ikki er júst tað rætta.

Hjá Siri fáast undirklæði, skógvar, náttúruheilivágur, krem og mangt annað heilsugott í samband við vælveru.

Sum tey siga hjá Siri: Stytsti vegur til vælveru er ein vitjan hjá Siri.

Fimm starvsfólk arbeiða skiftandi tíðir hjá Siri.

*Dagfinn Olsen*










